# Almennu Føroyar í velafrakka



Mynd: Reuters

**Fýra umboð fyri almennu Føroyar, við makum, sótu til borðs í riddarasalinum á Christiansborg, tá kongshúsið týskvøldið bjóðaði til galladøgurða í sambandi við komandi brúdleypið millum Fríðrik krúnprins og Mary Donaldson**

*Rúnar Reistrup, Keypmannahavn*
*runar@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Edmund Joensen, tingformaður, Mogens Nepper-Christensen, fúti, og Birgit Kleis, ríkisumboðsmaður, øll við frú uttan seinast nevnda, ið hevði mannin Brian Gronemann við sína lið, vóru týskvøldið til galladøgurða í riddarasalinum á Christiansborg umboðandi almennu Føroyar. Høvið var sjálvsagt komandi kongaliga brúdleypið, sum hesa vikuna setur sín dám á alt og øll í danska høvuðs-staðnum.

- Tað var stórbært. Umstøðurnar vóru so flottar, at man fyri tað bara kundi sitið og start alt kvøldið. Eg eri ikki vanur við slíkt, og hóast eg havi sitið trý ár á Christiansborg, havi eg ongantíð sæð riddarasalin hjá drotningini fyrr, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

## Til borðs við Konstantin kongi

Løgmanni nýttist tó ikki at sita og stara alt kvøldið, tí hann sat til borðs saman við góðum fólki. Fyrrverandi danski forsætisráðharrin Poul Schlüter og danski innanríkisráðharrin Lars Løkke Rasmussen sótu við runda borðið hjá løgmanni, og tað sama gjørdu kona Bertel Haarder og fyrrverandi kongur Konstantin, ið er giftur fyrrverandi drotning Anne-Marie.

- Konstantin visti ikki nógv um Føroyar, hóast hann tóktist vera ein lisin maður, og hóast Anne-Marie fleiri ferð hevur verið í Føroyum sum barn og ung genta.

Fyrrverandi kongurin fekk tó væl at vita um landið frá løgmanni, sum eisini hálvavegna gav honum eina innbjóðing at koma á vitjan.

– Eg nevndi fyri honum at tað kundi verið stuttligt um tey onkuntíð komu til Føroya, men talan var ikki um nakra almenna innbjóðing sum so. Nú kann hann hugsa um tað, sigur Jóannes Eidesgaard, sum møtti fyrrverandi grikska konginum fyri fyrstu ferð.

## Í forkunnugum klæðum

Tað var eisini fyrsta ferð at Jóannes Eidesgaard var at síggja í velafrakka, men tað upplivilsi var ikki so stórbært, at hann fekk smakk fyri hesum klassiska klædnaplaggi.

– Allir vóru í velafrakka, so allir líktust. Tað haldi eg vera eitt sindur keðiligt. Og eg má siga sum er, at eg kendi meg ikki væl í hasum klæðunum. Tey vóru so fremmand fyri meg, at eg onkuntíð kendi tað sum um at eg ikki var til staðar sjálvur.

Velafrakkan hevur løgmaður leigað sær. Hann verður tikin í nýtslu aftur fríggjakvøldið til brúdleypsveitsluna.

Løgmansfrúan, Anita Eidesgaard, var í gjár farin í ein svartan niðurdeil úr silki, sum hon keypti sær undan seinastu drotningarvitjanini í Føroyum. Yvirpartin keypti hon sær til høvið.

- Eg valdi ikki at fara í føroyskan búna, men tá eg sá Klaru Nepper-Christensen, konu Mogens Nepper-Christensen, í flottum føroyskum búna angraði eg eitt sindur, sigur løgmansfrúan.

Eisini Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, føroyska kona danska innanríkisráðharran Lars Løkke Rasmussen, var í føroyskum búna.

Í kvøld fer løgmansparið í føroyskan búna. Tey skulu tá í kongaliga teatrið saman við brúðarparinum og hinum innbodnu gestunum.

Løgmansparið umhugsar eisini at fara í búnan til vígsluna í Vor Frue Kirke. Men til veitsluna um kvøldið fer løgmaður aftur í velafrakkan, meðan løgmansfrúan fer í korsagu úr thai-silki, sum føroyski skræddarin Beinta Wilhelmsen hevur seymað henni.

## Undirhald uttan føroyskt innslag

Sum undirhald til gestirnar undir døgurðanum spældi Det Kongelige Musikkorps nøkur løg, harímillum eitt, sum bygdi á føroysku kvæðaløg. Men tá ymiskir tónleikarar og skemtarar seinni um kvøldið trinu á pallin fyri prominentu gestunum seinni um kvøldi, var einki at síggja til føroyska partin av ríkinum. Grønlendingar vóru umboðaðir av Julie Bertelsen, sum gjørdist kend í Danmark eftir at hava luttikið í Popstars kappingini hjá TV2. Hon sang ein grønlendskan sang fyri gestunum.

– Eg haldi at hon sang ótrúliga vakurt, og eg kundi ikki lata vera við at hugsa hvat Eivør Pálsdóttir, Guðrun Sólja Jacobsen ella Brandur Enni ikki kundu gjørt á hasum pallinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað er ósagt um løgmaður eisini hugsaði um Esmar Eysturoy og Kalla Mohr, tá Linie 3 upptraðkaði fyri kongaliga brúðarparinum og hinum 354 fínu gestunum.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM




**Á Vikuskiftisferðini** til Danmarkar 28. – 31. mai verður skipað fyri forkunnigum Country-festivali umborð á Norrönu, har Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen skipa fyri.

So er tað nú, at tit country-nostalgikarar eiga at rakna við og leggja tykkum á telefonina. Frá 28. – 31. mai fara vælsvingandi country-slagarar at runga umborð á Norrönu og kendir luttakarar úr inn- og útlandi, fara at tryggja tykkum eina væleydnaða og ógloymandi country-ferð.

Á heimferðini úr Hanstholm luttaka donsku Country-bólkarnir Vest & Blus úr Esbjerg og Hjørring-Hirtshals Country Show Dance.

Millum framførslurnar fer kendi country-guru'in Petur Rouch at leggja plátur á – við øðrum orðum: undirhald uttan íhald.

COUNTRY-CRUISE

**Prísirnir eru hesir:**

| | |
|---|---|
| Couchettir | 800,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 900,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.000,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 1.200,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.400,- |
| 2 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.700,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

**Luttakarar eru:**
- Jens Lisberg
- Ragnar í Vík
- Rúni Lisberg
- Ólavur Højgaard
- Erling Berg
- Petur Rouch
- Vest & Blus úr Esbjerg
- Hjørring-Hirtshals Country Show Dance

TILTØK UMBORÐ
- Undirvíst verður í Country-Dansi á heimferðini
- Umborð verður søla av lutum, ið hoyra heima í Country & Western høpi.

SMYRIL LINE



Páll á Reynatúgvu undir fíggjarlógarviðgerðini í Løgtinginum týsdagin:

# Samstarv og politisk ábyrgd í fíggjarnevndini

**Páll á Reynatúgvu er valdur á ting fyri Tjóðveldisflokkin, sum situr í andstøðu, og Páll er framsøgumaður í fíggjarmálum og limur í fíggjarnevndini. Hann heldur, at góða samstarvið í fíggjarnevndini má halda fram líka til fíggjarlógin er samtykt**

FÍGGJARLÓG

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Hóast í andstøðu, so kendist tað náturligt, at Tjóðveldisflokkurin í sínum framhaldandi virki søkti samstarvið og politisku ábyrgdina í fíggjarnevndini.

Tað sigur Páll á Reynatúgvu, limur í Løgtingsins fíggjarnevnd, nú viðgerðin av fíggjarlógini er við at koma í hæddina, og fíggjarnevndin hevur latið álitið um borytingarnar úr hondum.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini í tinginum týsdagin vísti Páll á Reynatúgvu til fíggjarlógaruppskotið, sum Tjóðveldisflokkurin legði fram samstundis sum Bárður Nielsen og Føroya Landsstýri løgdu sítt uppskot fram.

- Um fíggjarnevndin tók tær lógarbroytingar við, sum Tjóðveldisflokkurin í sínum boði upp á ein fíggjarlógarkarm legði upp til, so lendi føroyska samfelagið júst á teimum 99 milliónunum í halli í 2004, sum var karmur okkara. Eitt hall, sum hevði verið ivaleysa stórt, og sum hevði verið munandi betri útgangsstøðið fyri fíggjarlógararbeiðið í 2005, har fyrireikingarnar longur eru byrjaðar, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tjóðveldistingmaðurin heldur, at tað er av alstórum týdningi, at góða samstarvið í fíggjarnevndini heldur fram.

– Eg haldi, at um vit skulu halda fast við tann semjusøkjandi leikin í fíggjarnevndini, so er tað týdningarmikið, at vit ikki skilja okkum sundur nú, men at vit royna at halda saman og finna tær loysnir sum skulu finnast, so tað enn einaferð er ein samd fíggjarnevnd, sum leggur álit fram, sigur Páll á Reynatúgvu.

Men Anfinn Kallsberg sigur, at ætlanin er ikki at beina uppskotið aftur í fíggjarnevndina, men hann sigur seg tó vóna, at tað verður ein samd fíggjarnevnd, sum kann standa aftanfyri tær broytingar, sum koma áðrenn triðju og síðstu viðgerð.

– Tað kann sjálvandi koma til sína roynd eisini við teimum broytingaruppskotum, sum eg havi boðað frá, at vit koma við til triðju viðgerð, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini.

Orðaskiftið á tingi um fíggjarlógaruppskotið:

# Serligar umstøður

**Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður og formaður í Løgtingsins fíggjarnevnd, sigur um arbeiðið hjá fíggjanevndini við fíggjarlógini, at serligar umstøður hava gjørt seg galdandi**

FÍGGJARLÓG

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Fíggjarnevndin hevur havt serligar umstøður at arbeitt út frá hesuferð, við tað at eg sjálvur útskrivaði val í desember, sigur Anfinn Kallsberg, fyrrverandi løgmaður.

Hetta hevði við sær, at táverandi fíggjarlógaruppskotið hjá fullveldissamgonguni fall burtur, og síðani hava føroyingar havt eina sokallaða provisoriska fíggjarlóg, sum merkir, at bert tær mest átroðkandi útreiðslurnar verða gingnar á møti.

Føroyingar liva enn við hesi fíggjarlóg, men nýggja samgongan, sum hevur sitið í 100 dagar (sí aðrastaðni í blaðnum), er væl á veg at samtykkja løgtingsfíggjarlógina fyri árið 2004.

– Vit hava hugt eftir hvørjari einstakari konto. Vit hava roynt at tikið ta luft úr skipanini, sum væl allir tingmenn eru klárir yvir er í skipanini, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini.

Hann sigur tó, at nevndarlimirnir kanska ikki hava havt nóg góða tíð, men leggur afturat, at samstarvið hevur verið ómetaliga gott í nevndini. Fíggjarnevndin telir eisini tjóðveldislimirnar Páll á Reynatúgvu og Karsten Hansen.

– Eftir at álitið hjá fíggjarnevndini kom fram tann mikudagin í farnu viku, hevur fokus verið sett á tær stóru sparingarnar, og víst hevur verið á, at sumt av hesum ber ikki til uttan uppsagnir. Men útgangsstøðið er roknskaparárið í fjør, og við einari lønarkompensatión, sum ikki er full í mun til teir sáttmálar, sum broyttir eru.

Tað sigur formaður í fíggjanevndini til atfinningarnar um, at landsstýrismennirnir hava fingið ov lítið at arbeiða við. Men Anfinn Kallsberg gevur tó greið tekin um, at hetta er ikki tað endaliga uppskotið, og tískil ber enn til hjá landsstýrismonnum at hækka játtanina. Men bert um landsstýrismennirnir hava grundgevingarnar í ordan.

– Vit koma við einum uppskoti millum aðru og triðju viðgerð, solieðiðs at tey tingini, sum kunnu begrundast, fáa ta jattan sum skal til, fyri at virksemi heldur fram í tí líki, tað hevur verið, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini.

Fíggjarlógaruppskotið við broytingunum hjá fíggjarnevndini er farið samtykt víðari til triðju og síðstu viðgerð. Aftaná triðju viðgerð verður endalig atkvøðugreiðsla, og fíggjarlógaruppskotið er tá væntandi avgreitt og vorðið til lóg.

Lloyd's Register - Føroyar
"Ship/Engineer Surveyor"

Lloyd's Register EMEA, er partur av Lloyd's Register Group, og er eitt leiðandi óheft klassingarfelag, ið hevur virksemi um allan heimin. Vit sóknast eftir umsøkjarum til skrivstovu okkara í Føroyum. Starvið er egnað fólki við hollum kunnleika til føroyska vinnu, serliga farma- og fiskivinnu, ið halda avbjóðingar eru spennandi.

**Starvslýsing:**
Marknaðarføra verandi og nýggjar tænastur til sjóvinnuna. Gera sýnsarbeiði fyri Lloyd's Register samsavarandi reglum og avtalum.

**Førleiki:**
- Maskinverkfrøðingur, skipsverkfrøðingur ella líknandi útbúgving
- Í minsta lagi 5 ára royndir innan sjóvinnuna, tað verði seg skipabygging, teknistovuarbeiði ella innan leiðslu í einum shipping felagi
- Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin er kunnugur við ISO, ISM og ISPS leiðsluskipanir
- Duga væl enskt, bæði munnligt og skrivligt. Alt innanhýsis samskifti er á enskum
- Duga væl føroyskt
- Teldukunnleika í at nýta Microsoft Windows / MS office
- Sjálvstøðugur, skil fyri handilsskapi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tað gerst neyðugt

**Setanarviðurskifti:**
- Eitt áhugavert, spennandi og sjálvstøðugt arbeiði
- Góð løn
- Eftirløn og aðrar ágóðar

**Áhugaðir umsøkjarar:**
Vinarliga sendið okkum eina umsókn og CV, har greitt verður frá, hví tygum meta, at tygum eru egnaður til hetta avbjóðandi og spennandi starvið hjá Lloyd's Register EMEA.

Umsóknin skal sendast Field Operations Manager, Alf Pearson, á bústaðinum niðanfyri ella til teldupostbústað copenhagen@lr.org, í seinasta lagið 1. juni 2004. Vinarliga setið tygum í samband við Alf Pearson á telefon +45 32961800, um tygum ynskja fleiri upplýsingar.

Lloyd's Register Group er eitt óheft felag, ið arbeiðir fyri at betra um góðskuna, trygdina og umhvørvis- og handilsligu úrslitini hjá okkara viðskiftafólkum kring allan heim. Royndir og virksemi okkara eru innan sjóvinnu, olju & gass, jarnbreytir og aðrar vinnur. Fleiri upplýsingar eru at finna á www.lr.org.

Lloyd's Register EMEA
Strandvejen 104A
DK - 2900 Hellerup

Lloyd's Register

team85




Til sølu

**Ognin matr. 1381E og 1381F, Tórshavn, Heykavegur 6, Tórshavn, verður við hesum lýst til sølu**

Til ognina hoyrir virkisbygningur, partvís í tveimum hæddum, til støddar 2.968 $m^2$ brutto, privat parkeringsøki til støddar 2.400 $m^2$ og stórt alment parkeringsøki. Goymslu-/amboðsskúrar uppá 271 $m^2$ hoyra eisini til ognina.

Byggiár: 1978

Ognin liggur væl fyri á ídnaðarøkinum á Hálsi og hevur tvær tilkoyringar.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til Føroya Tele, Jens Wang, tlf. 303030 ella 303377.

FØROYA TELE

team85